VÍF-Tjaldur 36-21 (21-8):

# Tjaldur í botni

**Eftir stórtapið í Vestmanna tykist stóri spurningurin vera, hvørt tað yvir høvur fer at eydnast Tjaldri at fáa stig hetta kappingarárið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn eru bara trý umfør farin av hondbóltskappingunum, men longu nú tykist í øllum førum greitt, hvat botnliðið í bestu kvinnudeildini verður.

Tjaldur hevur sýnt lítið sannførandi avrik í teimum báðum fyrstu dystunum. Dysturin móti VÍF mátti herfyri eisini útsetast, tí trupulleikar vóru við at fáa fólk til upprunaliga leikdagin, men hóast dómaraseðilin kundu fyllast hóskvøldið, so munaði hetta lítið samanlagt.

VÍF – sum undan dystinum var stigaleyst – snøgt sagt hølvaði Tjaldur ígjøgnum, tá dysturin varð leiktur hóskvøldið. Longu fyrsta korterið vóru greiðar ábendingar um, at her fór bara at verða ein vinnari, og tá heimaliðið so økti úr 12-6 upp í 21-8 mundi eingin ivi vera um, at talan fór at gerast um stórsigur.

Seinna umfarið var munurin ikki heilt so stórur, men spenningur kom so ongantíð í. VÍF meira ella hugsaði um at halda tørn, samstundis sum tær kundu taka sær hálvgum av løttum, og so var ikki so øgiliga nógv at tosa um. Mest merkisvert í so máta var helst, at Alis Høghamar nú aftur er á vøllinum, hóast hon fyri góðum ári síðani staðfesti, at nú var liðugt hjá henni við hondbólti í bestu deildini.

So er spurningurin, hvørt VÍF við hesum fekk nakað av sjálvsáliti undan næstu uppgávuni. Hon er sunnudagin ímóti Kyndli, sum heldur ikki tykist vera millum sterkastu liðini í deildini. Tjaldur skal tá royna seg á útivølli móti Neistanum, sum tykist vera komið heilt væl frá byrjan.

## FAKTA UM DYSTIN

**VÍF-Tjaldur 36-21 (21-8)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rápa 12(3), Eyðritt Andreasen 9, Alis Høghamar 3, Annfríða Helgadóttir 4, Kirstin Helgadóttir, Tórunn Andreasen 2, Linda Johannesen 2, Sára Jógvansdóttir
**Tjaldur:** Vesna Tomajek 9(4), Kristine Ellingsgaard 3, Heidi Heinesen 3, Jacoba Langgaard 2, Anni Højgaard 1, Kirstin Jacobsen 1, Julianna Rasmussen 1, Mona Langgaard 1
**Brotskøst:** VÍF 3, Tjaldur 4
**Útvísingar:** VÍF 3, Tjaldur 5
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum

# Brak á Hálsi

**Fyrsta útgávan av stóra klassikaranum í føroyskum manshondbólti verður leikt um vikuskiftið. Og bæði Neistin og StÍF skulu nú royna at ressast aftur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður ikki meira spennandi enn tað sama. Seinasti og altavgerandi dysturin í manskappingini í hondbólti í vár millum Kyndil og VÍF varð ikki avgjørdur, fyrr enn klokkan stóð á 30.00. Brotskastið, sum Jónleif Sólsker tá setti í netið, bjargaði Kyndli javnleikin og harvið føroyameistaraheitið, og so kundu grønu viðhaldsfólkini fegnast, meðan vestmenningarnir ilskaðust um brotskastið, sum teir ikki vildu kennast við.

### Nervin verður har

Sunnudagin hittast somu liðini við somu dómarum, og tó at talan neyvan verður um sama intensitet og sama spenning, so er einki at ivast í, at talan er um ein dyst, sum fer at hava stóran áhuga. At talan so eisini er um tey bæði liðini, sum higartil hava staðið seg best í kappingini, fer á ongan hátt at gera spenningin minni.

VÍF hevur higartil gjørt tað til sína sergrein at vinna teprar sigrar. So leingi sum munurin er eitt mál, so koma stigini til høldar, tykist hugburðurin at hava verið, og heldur tað aftur hesaferð, so er einki at ivast í, at tey í VÍF eru vælnøgd. Hinvegin er einki dulsmál, at skal VÍF gera sær vónir um stig sunnudagin, so skal avrikið helst verða nakað betri, enn tað var seinast, tá teir vóru mest sum hepnir við at toga sær tvey stig burtur úr dystinum móti KÍF.

Tí eftir eitt sjokk-tap fyri KÍF í fyrsta umfarinum, hevur Kyndil verið mest sum flúgvandi. Bæði Neistin og StÍF eru send heim við stórum ósigrum, og kann sama skjóta spælið fasthaldast sunnudagin, so kann tað sama væl henda enn einaferð. Tað kann tó væl hugsast, at nervin í dystinum hesaferð verður ein annar, enn hann hevur verið tær báðar ferðirnar. Er tað nakað, sum hesi lið ikki vilja, so er tað at tapa fyri hvørjum øðrum, og tí er tað einasta, sum tykist heilt víst, at kreftirnar fara ikki at verða spardar sunnudagin.

### Neistin og StÍF í mótbrekku

Leygardagin verður tó eisini hondbóltur í Havn. Neistin skal á heimavølli móti KÍF royna at sannføra um, at teir hava eitt betri lið, enn stigaleysa stigatalvan ber boð um. Tað líkist kanska ikki eini heilt vónleysari uppgávu móti KÍF, men hinvegin hava kollfirðingar í nógvar mátar roynst drúgvari, enn fólk høvdu roknað við hesar fyrstu dystirnar.

Seinasti dysturin verður á Skála sunnudagin, har StÍF skal reisast eftir risa-tapið fyri Kyndli. Tað verður tó ikki nøkur løtt uppgáva. Hoyvíkingar hava fingið eina fína byrjan upp á kappingarárið. Teir spæla bæði skjótt og kontant, og so er spurningurin, hvørt strandingar hesaferð eru meira vaknir, enn teir vóru seinasta sunnudag.




Vikuskifti
Nr. 208 • Vikuskiftið 30.–31. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Miðvís granskingarmenning ella Disney
Lesið síðu 38
TING-HELLAN




# Kirstin hitti Teit í Ohio

UMMÆLI
*Kirstin Joensen, skiftisnæmingur í Coshocton, Ohio i USA*

Tað var týsdagur 19. oktober. Hevði havt ein vanligan dag í skúlanum. Gingið og runnið aftur og fram millum flokkarnar og tosað amerikanskt allan dagin.

Eg kom so heim og fór at kanna teldupostin. Fann eitt bræv, sum pápi mín hevði sent mær, har hann fortaldi at Teitur skuldi spæla í Columbus, Ohio.

Tað tekur bara umleið ein tíma at koyra til Columbus hiðani, sum eg búgvi, so eg spurdi míni vertsforeldur, um vit ikki kundu fara. Tey vóru beinanveg við uppá tað, so vit avgjørdu at fara.

Mær hevur altíð dámt tónleikin hja Teiti, so eg helt, at tað for at verða nokk so stuttligt at fara. Kanska eg eisini møtti onkrum føroyingi har?

Eftir skúlatíð dagin eftir fóru vit so avstað. Hann skuldi spæla á einum staði, sum kallaðist Little Brother,s.

Tað tók eina góða løtu at finna staðið. Tað var ein gamal banki, sum var gjørdur um til eitt lítið, hugnaligt spælistað. Vit stóðu uttan fyri og bíðaðu i eina góða løtu fyri at sleppa inn. Fleiri onnur fólk stóðu eisini og bíðaðu. Eg tosaði við tvær gentur, sum gingu á The Ohio State College. Tær fortaldu mær, at øll á skúlanum tosaðu um Teit, um hvussu væl hann dugdi o.s.fr., so fleiri av teimum vóru komin har at lurta tað kvøldið. Helt at tað var nokk so stuttligt, at so nógv høvdu hoyrt um hann.

Vit sluppu so inn. Keyptu atgongumerki og settu okkum niður. Ein maður kom so á pallin. Hann segði, at hann skuldi hita upp fyri Teit. So hann spældi í eina góða løtu. Hann var úr Columbus sjalvur. Hann dugdi ógvuliga væl. Spældi akustiskan gittara og sang sínar egnu sangir.

Aftaná helt eg so, at Teitur for at koma a pallin, men tá kom ein annar bólkur. Teir skuldu eisini hita upp fyri Teit. Teir vóru allir úr Nashville. Teirra tónleikur var ein blandiningur av Coldplay og Saybia, haldi eg. Teir dugdu ógvuliga væl!

Og sum tíðin gekk, komu fleiri og fleiri fólk. Hesin bólkurin spældi í umleið 1 tíma. Teir góvust so at spæla. Haldi at tað vóru uml 40-50 fólk inni tá, so tað var nokk so fult. Ein maður fór á pallin, gjørdi alt klárt.

Hann tendraði fleiri stearinljós og setti tey á pallin fyri at gera tað meira hugnaligt. Men eigarin av hesum spælistaðnum vildi ikki hava tey á pallinum, so hann mátti sløkkja tey.

Endiliga kom Teitur á pallin. Hann var vanliga klæddur. Sá avslappaður út. Øll fólkini klappaðu.

Hann setti seg á ein stól og tók gittaran fram og byrjaði at spæla. Hann spældi sangir av fløguni »Poetry and aeroplanes«. Øll sótu og smiltust og lurtaðu.

Veit ikki heilt, hvat tað er, sum ger at man fer at smílast, tá man lurtar eftir honum, men man kann ikki lata vera!

Teitur hevði ikki brúk fyri at hava stearinljós á pallinum fyri at gera stemningin hugnaligari. Tað var hann, sum gjørdi tað hugnaligt við síni rødd og gittarspæli.

Teitur fekk hjálp fra einum dana, sum spældi trummur og bass. Hann spældi í umleið ein tíma. Hann spældi eisini nakrar nýggjar sangir, sum hann stutt sídani hevði gjørt. Hann dugdi væl at undirhalda eisini. Fortaldi nakrar jokes.

Tá konsertin var liðug klappaðu øll, alt tað tey kundu. Konsertin var væleydnað. Fólk reistust og fóru at keypa fløguna hjá honum. Eg fór so eisini yvir har. Har stóð ein maður. Hann sá einki serliga amerikanskur út, so eg spurdi bara, um hann var føroyingur, og ja, tað var hann. Haldi, at hann var hjálparfólk hjá Teiti ella okkurt líknandi. Tað var ógvuliga stuttligt endiliga at síggja ein føroying eftir at hava verið her í næstan tríggjar mánaðar. Hann var ovfarin av at síggja meg, ein føroying, har.

Hann spurdi, hvat eg gjørdi her, og hvaðani eg var. Tað var bara stuttligt. Eina løtu aftaná kom Teitur. Eg tosaði so eisini við hann. Hann var bara heilt fittur. Var eisini ovfarin av at síggja meg har. Tað var deiligt at sleppa at tosa við onkran føroying aftur. Tað segði Teitur eisini sjálvur.

Hann spurdi so eisini, hvussu mær dámdi her og hvussu tað gekk. Teitur man vita eitt sindur um, hvussu tað er at vera burtur frá familju, vinum og Føroyum. Tað hoyrir man í sangunum hjá honum. So tað er nokk so hugnaligt at sita og lurta eftir tónleikinum hjá honum, tá man er í somu støðu.

Teitur hevur leingi verið ein stjørna í Føroyum og er tað eisini í USA nú. Men háast tað, so er hann "down-to-earth". Hann skal nokk klára seg fínt í framtíðini við evnunum, sum hann hevur.